

Krúnborg keypt 2/3 av Shipping.fo

# Krúnborg keypir 2/3 í Shipping.fo

**Jan Müller**

31.12.2013 - 15:15

Oljan.fo

P/F Krúnborg og Sp/f Shipping.fo hava í dag undirskrivað avtalu, har Krúnborg keypir 2/3 av Shipping.fo.

Avtalan er ein liður í at gagnnýta vitanina og framtíðarætlanirnar hjá báðum pørtum innan shipping management.

Jónas Sigmarsson, stjóri í felagnum er ein av eigarunum:

”Bæði Krúnborg og vit eru í eini tilgongd innan júst sama virksemi og tí meta vit, at nýggja eigarasamansetingin gevur stórar fyrimunir fyri báðar partar”.

Shipping.fo er eitt felag, sum hevur drúgvar royndir við ”Shipping Management” og P/F Krúnborg hevur líka aftur til 1964 fingist við skiparakstur.

Sambart Krúnborg er høvuðsendamálið við keypinum av Shipping.fo at víðarimenna management partin, soleiðis at Shipping.fo verður enn sterkari at taka ímóti framtíðar avbjóðingum.

Ein tilgongd er nú sett í verk at skipa samanleggingina. Felagið, Shipping.fokemur at hava sítt dagliga virksemi á Mykinesgøtu 5, Tórshavn har P/F Krúnborg heldur til.

Petur Jacobsen, stjóri í  Krúnborg Offshore sigur við oljan.fo, at nú tey eru farin inn í frálanda- og oljuvinnuna, fer tað at verða arbeitt við, at hesar vinnurnar, eitt nú frálandaskip eisini gerast partur av arbeiðinum hjá Shipping.fo.

Mynd: Umboð fyri P/F Krúnborg og Shipping. fo